# Sannførandi Blikagentur

**Í sama stóra stíli sum á fjarðastevnu hildu genturnar á Bliki til beins frá startskotinum og komu á mál langt framman fyri allar hinar bátarnar**



FIMMMANNAFØR GENTUR

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Ikki vórðu mong tøk tikin, tá Blikur av Argjum tók oddin og spakuliga otaði seg longur og longur fram um allar hinar bátarnar. Genturnar av Argjum øktu allan vegin, og tað var ongantíð nakar serligur spenningur í róðrinum. Komnar á mál kundu Blikagenturnar fegnast um enn ein stórsigur og einasta føroyameistaraheitið til suverena felagið av Argjum í fjør, sum vann heili trý føroyameistaraheiti.

Stríðið í hesum róðrinum stóð um hinar plaseringarnar. Tekla, Havfrúgvin, Tjaldrið og Drekin stríddust allan vegin um annaðplássið. Men tá avtornaði gjørdist Tekla úr Klaksvík nummar tvey og Tjaldrið fekk triðjaplássið. Genturnar á Teklu vóru tó so fegnar um annaðplássið, at um ein ikki visti betur, so kundi teirra sigursróp bent á, at tær høvdu vunnið róðurin. Genturóðurin er nú eisini avgjørdur, tá tað snýr seg um føroyameistaraheitið, men eins og hjá hinum manningunum er tað eisini umráðandi at vinna róðurin á Ólavsøku.

**5 mannafør gentur**
1 Blikur 05:22.18
2 Tekla 05:30.09
3 Tjaldrið 05:31.07
4 Drekin 05:34.03
5 Havfrúgvin 05:35.04 1G
6 Erla Kongsdóttir 05:52.23

*Argjagentur umborð á Bliki enn einaferð sannførandi fyrst um málið, og føroyameistaraheitið hava tær longu vunnið*

*Mynd: Álvur*

*Ongin ivi var hjá fimmmannaførum við gentum. Blikur av Argjum vann enn ein sannaførandi sigur*

*Mynd: Álvur*







# FM støðan í kappróðri eftir vestanstevnu

**5 mannafør dreingir**
1 Fípan Fagra 36
2 Ritan 33
3 Síliđ 23
4 Blikur 17
5 Drekin 17
6 Tjaldrið 6
7 Dúgvan 0 1G
8 Tekla 0

**5 mannafør gentur**
1 Blikur 38 FM
2 Drekin 30 1G
3 Tekla 22
4 Tjaldrið 22 1G
5 Havfrúgvin 8 1G
6 Erla Kongsdóttir 7 2G

**5 mannafør kvinnur**
1 Síliđ 40 FM
2 Blikur 24
3 Fípan Fagra 24
4 Frúgvin 19 1G
5 Drekin 12 2G
6 Firvaldur 8
7 Royndin Fríða 4
8 Ørnin 1 1G
9 Junkarin 0
10 Ritan 0
11 Falkur 0

**6 mannafør kvinnur**
1 Jarnbardur 42 1G FM
2 Riddarin 30
3 Lómur 24
4 Páll Fangi 18 1G
5 Sølmundur 11 1G
6 Víkingur 2
7 Gongurólvur 2

**6 mannafør menn**
1 Gongurólvur 37 1G
2 Jarnbardur 32 1G
3 Sølmundur 18 2G
4 Strálan 17 1R
5 Sundabáturin 17
6 Hósvíkingur 4 1G
7 Páll Fangi 3 1G
8 Lómur 2
9 Víkingur 2
10 Fuglfirðingur 0 1G
11 Smyril 0
12 Stjørnan 0
13 Kollfirðingur 0

**8 mannafør menn**
1 Nevið Reyða 42 FM
2 Kvívíkingur 30 1G
3 Argjabáturin 22 1G
4 Ørvur 20 1G
5 Árnfirðingur 12
6 Miðvingur 5 1G
7 Knørrur 1

**10 mannafør menn**
1 Eysturoyingur 40 FM
2 Nólsoyingurin 30 1G
3 Hoyvíkingur 23
4 Havnarbáturin 19
5 Vágbingur 14
6 Skálabáturin 7
7 Vestmenningur 0 1G



*Mynd: Bárður*

**Berit Mohr rør við Teklu og situr á lærinum í bakborð:**

## Góðar vónir til Ólavsøku

Hóast Tekla úr Klaksvík kom á mál tvær bátslongdir aftan fyri Blik, hava ungu klaksvíksgenturnar nú góðar vónir til Ólavsøkuróðurin.

- Vit høvdu als ikki væntað at megna eitt annaðpláss, so vit fingu rættiliga trúnna upp á okkum sjálvar eftir róðurin, sigur bátsformaðurin á Teklu.

Hon greiðir frá, at miðróðurin hjá teimum als ikki var av tí besta, og tá lógu tær á einum fjórða ella fimtaplássið.

- Men endaspurturin hjá okkum var avbera góður, og tá vit komu á mál, sóu vit, at vit vóru nummar tvey, sigur Berir ovurfegin.

Hon hevði lovað undan róðrinum, at megnaðu tær eitt annaðpláss, so skuldi hon renna høvdið niður í sjógvin. Tað endaði so við, at allar genturnar á Tekla í ovfarakæti gjørdu tað, so saltvatnið rann niður eftir vangunum á teimum.

Sigurin hevur sum sagt givið teimum sjálvsálit, og tær eru farnar í gongd við venjingarnar til seinasta róðurin í ár.

- Vit venja ordiliga hart nú, tí vit hava fingið trúnna uppá, at Blikur kann takast, sigur Berit Mohr.

